## Eldraráðið í Havn valt

Eftir uppteljing við Snarskivuna hjá Tórshavnar kommunu í gjarkvøldið er greitt, at fyrst valda umboð til Eldraráðið er verandi formaður, Marita Arge Magnussen, skrivar torshavn.fo. Hon fekk 401 atkvøður. Mortan Rasmussen fekk 255 atkvøður, Jákup Lindenskov 203, Jóannes Dalsgarð, Velbastað, 182 og Gunnvør Joensen í Nólsoy 140 atkvøður. Hesi eru beinleiðis vald. Eykavald eru Ása Østerø, Grete Ellingsgaard, Poula Apol, Brynhild Danielsen og Marjun Sigurdardóttir. Tilsamans 12 fólk stillaðu upp til valið. Uppgávan hjá Eldraráðnum er at gera vart við viðurskiftini hjá eldru borgarunum í høvuðsstaðarkommununi og at geva býráðspolitikarunum góð ráð á hesum øki. Valda Eldraráðið tekur við eftir ársskiftið og situr í fýra ár.



*Frá uppteljingini í Snarskivuni í gjárkvøldið til eldraráðið*
*Mynd: torshavn.fo*

# gerast í Suðurstreymi



*Glyvursnes sæð út ígjøgnum rútin á einum flogfari. Hetta er einasta stað í Føroyum, sum er egnað at gera ein framtíðar flogvøll á, men Nólsoy kann eisini koma upp á tal, tí har líkjast umstøðurnar teimum á Glyvursnesi. Ì Suðurstreymoy er vítt til veggja og tað hevur stóran týdning, skulu vit sleppa undan turbulensi, sigur Bjarki Jensen, tyrluskipari*

## Kanna tríggjar møguleikar

Í nógv ár hevur verið tosað um at bøta um flogvallarviðurskiftini í Føroyum. Í hesum sambandi hevur ofta verið tosað um, at einasta rætta er at vit gera ein stóran, altjóða flogvøll í Føroyum, sum fer at lúka tey krøv, sum framtíðin setir til flogferðslu, og sum vit kunnu fáa fulla nyttu av, ikki minst í sambandi við flutning av spillfeskum fiski og øðrum farmi.

Í hesum sambandi hava tey flestu verið av teirri áskoðan, at tað einasta rætta er at gera ein altjóða flogvøll upp á einar 2200-3000 metrar.

Men stóri spurningurin hevur verið, hvar hann skal vera.

Fyribils eru tað mest fýra øki, sum eru kannaði. Í fyrsta lagi hevur talan verið um at byggja vøllin í Vágum út. Men annars eru Glyvursnes í Suðurstreymoy, Skorðhæddin í Eysturoy og Søltuvík í Sandoy nevnd sum møguligar staðsetingar fyri einum altjóða flogvølli.

## Mjørki ein trupulleiki í Vágum

Í sambandi við ein flogvøll í Vágum, er tað ikki bara turbulensur, sum er ein stórur trupulleiki.

Tað sigur Bjarki Jensen tyrluskipari.

Hann sigur, at ein annar stórur er, at í Vágum ber ikki til at seta nøktandi innflúgvingartól upp, sum kunnu hjálpa flogførum at lenda í svartasta mjørka.

- Útsynningur og har um leiðir, eru tær ættirnar, sum eru vanligast í Føroyum og tá verður flogið inn yvir Sørvágsfjørð.

- Men innflúgvingin har er í vinkul, tí tá ið flogfarið er komið nakað inn, skal snarast 13 stig.

Hinvegin ber ikki til at fáa signalini frá innflúgvingartólunum at ganga í vinkul og tí fæst ikki full nytta úr teimum nýmótans innflúgvingartólunum, sum nú eru til taks og gera, at tað ber til hjá flogførum at lenda, hvussu svart tað so enn er í mjørka, sigur Bjarki Jensen.

## Ein millión fyri meturin

Bjarki Jensen heldur, at ístaðin fyri at longja flogvøllin í Vágum fyri eina millión fyri meturin, hevði tað verið nógv skilabetri at brúkt peningin til at projektera ein nýggjan altjóða flogvøll í Suðurstreymoy og kanska kundi verðið farið undir byggingina eisini.

- At longja vøllin í Vágum tænir lítlum og ongum endamáli, tí flogførini, sum kunnu brúka vøllin, verða at kalla tey somu og innflúgvingin verður heldur ikki øðrvísi, um so vøllurin verður 350 metrar longri.

## Nýggjur flogvøllur: Tyrluskiparar vita best

**Upp undir løgtingsvalið í januar var almennur fundur á Hotel Føroyum um flogvallarviðurskiftini og um týdningin av at hava ein altjóða flogvøll í Føroyum.**

**Tá tók eisini ein flogskipari hjá Atlantsflogi orðið og hann helt, at vit skulu ikki yvirdríva at brúka fleiri ár um at gera kanningar av turbulensi.**

**- Vilja tit hava nakað at vita um turbulens, skulu tit bara spyrja tyrluskipararnar, tí tað vita teir alt um, var heilsanin frá flogskiparanum til fundarfólkið.**

**Síðani hava vit fleiri ferðir roynt at spyrja flogskiparar á bæði tyrlum og flogførum um hesi viðurskifti, men so løgið tað ljóðar hevur tað verið at kalla ómøguligt at fáa nakran at siga sína hugsan.**

**Men nú hevur tað so eydnast at finna ein tyrluskipara, sum vil siga sína hjartans meining um flogvallarviðurskiftini í Føroyum.**

**Og hann ivast ikki í, at tað er bara eitt stað í landinum, sum kann brúkast at gera ein stóran, altjóða flogvøll á og tað er í Suðurstreymoy.**



## Samgonguskjalið

Samgonguskjalið hjá nýggju ABC samgonguni, sigur ikki so nógv um flogvallarviðurskiftini. Men samgongan hevur kortini sett flogvøllin á listan yvir fimm tær dýrastu íløgurnar, sum skulu gerast tey næstu árini.

Um flogvallarviðurskiftini sigur samgonguskjalið, at:

Ætlanin um at leingja flogvøllin verður framd, eins og kanningar viðvíkjandi alternativum flogvallarmøguleikum halda fram.

Hinar fýra tær dýrastu íløgurnar, sum farast skal undir hesi næstu árini, eru skúladepilin í Marknagili í Havn, Sandoyartunnilin, um- og útbyggingin av Landssjúkrahúsinum og Skálafjarðartunnilin, men samgongan ætlar, at hann skal verða ein privat íløga, soleiðis sum upprunaliga ætlað.